Musikkskúlaskipanin

Royndir verða í november 2002

Royndir í ljóðførisspæli, sangi og skrivligari teori verða í november 2002. Næmingar tekna seg sjálvbodnir, og støðutakan eigur at verða tikin í samráð við lærara fyri summarsteðgin. Prióvdómari frá **Associated Board of the Royal Schools of Music** í London kemur higar. Føroyskur tulkur er til royndirnar.

Endamál

- Royndirnar geva næmingi møguleika at seta sær ávegis mál, og at fáa eina meting eftir altjóða støði.
- Prógv verður givið tá ið royndin er staðin. Minsta krav er 100 av 150 møguligum stigum.

Royndirnar

RoyND fyri byrjarar har skrivligt ummæli verður givið beinanvegin. (Preparatory Test).

RoyND fyri leikarar eldri enn 21 ár, byrjarar eins og yrkisleikarar, sum ynskja eitt óheft, professionelt skrivligt ummæli beinanvegin, og eina samrøðu við prióvdómaran. (Performance Assessment).

Stig 1, 2, 3, 4, og 5 royndirnar eru skipaðar soleiðis:

- Næmingurin spælir trý sjálvvald stykkir av ABRSM lista, ið hann hevur lært seg frammanundan.
- Næmingurin spælir teir tónastigar (skalair) og tríljómar (arpeggios), sum standa í ABRSM skránni.
- Næmingurin spælir eitt stutt stykki eftir nótum, sum hann ikki hevur sæð frammanundan.
- Næmingurin verður biðin at klappa antin pulsin ella lag-rútmuna meðan prióvdómarin spælir á klaver. Næmingurin skal siga um stykkið gongur í tveimum, trimum ella í fýra sløgum í taktini.
- Prióvdómarin spælir ein stuttan setning tvær ferðir. Næmingurin verður biðin at syngja ella murra tað sama beint eftir at dómarin er liðugur.
- Á hægru stigunum verður næmingurin biðin at syngja nakrar tónar eftir nótum. Prióvdómarin spælir fyrsta tónan og spælir eisini rættan tóna, um næmingurin fer skeivur. Royndirnar vara umleið 12-16 minuttir.

Fyri at sleppa til royND á Ljóðføri ella í sangi í 6., 7., og 8. stigi, skal næmingurin hava staðið skrivligu teoriroyndina á 5. stigi. Skrivligar teoriroyndir eru tríggjar ferðir um árið.

Prióvtøkugjøld

Í ljóðførisspæli ella sangi	**Í skrivligari teori**
RoyND fyri byrjarar (Preparatori Test) kr. 265,-	
Stig 1 kr. 325,-	Stig 1 kr. 185,-
Stig 2 kr. 365,-	Stig 2 kr. 185,-
Stig 3 kr. 365,-	Stig 3 kr. 185,-
Stig 4 kr. 440,-	Stig 4 kr. 245,-
Stig 5 kr. 440,-	Stig 5 kr. 245,-
Stig 6 kr. 510,-	Stig 6 kr. 315,-
Stig 7 kr. 590,-	Stig 7 kr. 315,-
Stig 8 kr. 650,-	Stig 8 kr. 315,-

RoyND fyri tónleikarar eldri enn 21 ár (Performance Assessment) kr. 440,-
Prógv á konservatoriistøði (Advanced Certificate), úr kr. 1.160,- til kr. 6.210,-

Tilmelding í seinasta lagi 20. september 2002 hjá Musikkskúlaskipanini, Hoyvíksvegur 72 FO 100 Tórshavn, tlf. 316462, fax 316991, t-postur: martin@mmr.fo

Meira fæst at vita hjá leiðaranum Martin Mouritsen, tlf. 216462

Sosialurin
Sosialurin
i

Toll- og Skattstova Føroya

Barna- og hjúnapeningur

Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Figgjarmálaráðnum.

Uppgávur stovnsins eru m.a. at fyrisita
- skattalógina
- tolllógina
- mvg-lógina
- kolvetnisskattalógina
- avgjaldslógirnar.

eins og alla skuldarinnkrevjing hjá landinum.

Planlegging og menning fer fram í Stýrinum á Argjum.
Tær seks økisskrivstovurnar røkja raksturin.

www.tollskatt.fo

Innheinting av barnapeningi, hjúnapeningi v.m. verður frá 1. oktober 2002 umsitin av Toll- og Skattstovu Føroya

EYSTUROYAR ØKI
SALTANGARÁ

Allir fyrispurningar v.m. viðvíkjandi innheinting av nevnda peningi verða framyvir avgreiddir av:

Toll- og Skattstovu Føroya
Eysturoyar Øki
Heiðavegur
Postsmoga 225
FO-600 Saltangará
Tlf. 448588
Telefax: 448481
E-post: eysturoy@tollskatt.fo

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:

Skrásetingar-nr. Sp/f 3352
Navn: Sp/f Arrow
Adressa: Bøvegur 38, 530 Fuglafjørður
Kommuna: Fuglafjarðar Kommuna
Stovningardato: 18.04.2002
Viðtøkudato: 18.04.2002
Kapitalur: Kr. 100.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kontant kr. 100.000,00 til kurs 100.
Stovnarar: Leif Sleire, Bøvegur 38, 530 Fuglafjørður og Kári Leonhardsen, Rossagerði 5, 530 Fuglafjørður.
Stjórn: Leif Sleire, Bøvegur 38, 530 Fuglafjørður og Leonhardsen, Rossagerði 5, 530 Fuglafjørður.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av stjórunum hvør sær.
Grannskoðari: Sp/f Grannskoðarastovan á Skála, 480 Skáli.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 18.04.2002 - 31.12.2002
Endamál: Endamál felagsins er at reka søluvirksemi o.a. í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 2. september 2002

Kristin Balle

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. P/F 2452, P/F Faroe Seafood, 100 Tórshavn.

Nevnd:
Farin úr nevndini: Óli Meinertsson Hansen, Millum Gilja 49, 188 Hoyvík (formaður), Bergur í Garði, Haraldstrøð 8A, 100 Tórshavn (næstformaður), Jens Josefsen, Sømandshvile Park 23, DK-2960 Rundsted Kyst, Sofus Poulsen, Aggusteinsvegur 1, 188 Hoyvík og Petur Even Djurhuus, N. Mohrsgøta 7, 188 Hoyvík.
Innkomin í nevndina: Hákun Steingrímsson, Mikkjalstrøð 5, 100 Tórshavn (formaður), Thomas Arabo, 416 Signaburur (næstformaður) og Johannes Jensen, Millum Gilja 111, 188 Hoyvík.

Skráseting Føroya tann 2. september 2002

Kristin Balle

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. P/F 2404, P/F Vørðustíggjur, 235 Dalur.

Viðtikið 01.07.2002 at lækka partapeningin við annulatión av egnum partabrøvum sambært § 48b, jvb kap. 7 í P/F-lógini, við kr. 50.000,00 til kurs 100 eftir at proklama er runnin.

Skráseting Føroya tann 2. september 2002

Kristin Balle

internet
Sosialurin
www.sosialurin.fo

Til keyps og leigu:

- Minigravimaskina á beltum - 800 kg
- Bob Cat lessumaskina, til fjølbroyttar uppgávur
- Transportari á beltum til sand, grús, asfalt o.a.
- Trumla til asfalt, grús, sand
- Luftkompressarar, luftamboð og boriútgerð
- Fasadustillads og aluminium stillads á hjólum
- Forskallingar og forskallingsútgerð
- Sjálvkoyrandi lift røkkur 19 metur
- Ymiskar maskinur og amboð

Umframt mangt annað!

Kaj Andreasen & Co
Heilsøla, smásøla & umboð - Tel. 315600 - Fax 318008

veitst tú ikki tað?
Sosialurin

LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.

tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

Akfør

OPEL ASTRA 2.0 Di
16v, diesel, við skaða til sølu, allir eykalutir fylgja við, árg. 99, 60.000 km.
Tlf. 228635

WV GOLF TDI
árg. 1999, koyrt 75.000 km til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 332363

NISSAN SUNNY 1.6 SLX
árg. 88 til sølu fyri 17.000 kr. Sportfelgur + pikadekk á felgum fylgja við. Bilurin er nýsýnaður.
Tlf. 310381 ella 266899

HYGG HER!
Nýsýnaður Toyota Corolla til sølu fyri 10.000 kr. Koyrir vael.
Tlf. 317198 / 253242

TIL SØLU
Nýtt útstoyt til Toyota Corolla árg 87 til sølu fyri einans 1000 kr. kostar vanl. yvir 2000 kr.
Tlf. 310310

PEUGEOT 406 COUPÉ
Árg. '99, koyrt 55.000 km til sølu fyri 175.000 kr.
Tlf. 444595 ella 212595

DRÍVAKSIL
Drívaksil til Carina II, AT 171, árg. '90 ynskist til keyps. Ringið
Tlf. 221631/423108

MOTORUR YNSKIST
Brúktur motorur til Ford Orion 1.8 diesel, ynskist bíliga til keyps.
Tlf. 224915

MERCEDES BENZ 300D
Nýsýnaður, í góðum standi, aut. gear, sóltak, sentrallás, cd-spælara, Siemens tlf. sportfelgur, eyka sett av felgum. Einans 60.000 kr.
Tlf. 218181

4 FELGUR VIÐ DEKKUM
Stødd 195/65 15". Holavstandur 10 mm/4 hol, passa m.a. til Renault Laguna, til sølu fyri 1.800
Tlf. 318675

TOYOTA CAMRY 2.0 XLI
árg.89, koyrt 158.000 km.
Tlf. 449051 eftir kl. 19 ella 225479

TOYOTA COROLLA CE 90
til sølu, st. car, árg. 08/89, diesel. Góðkendur sýn mai 02, koyrt 190.000.
Tlf. 224411

MAZDA 323 1.6
Árg. '91, Koyrt 105.000 km. Prísuppskot: 20.000 kr,
Tlf. 318575

TIL SØLU
Opel Ascona, árg. 88 til sølu sum eykalutir.
tlf. 421600, 254611 ella 211600

FORD MONDEO, TD-RS
Bilurin er vínreyður og hevur koyrt 127.000 km, er stationcar. Er vel viðfarin. Prísuppskot kr. 95.000. Ring vinarliga á
Tlf. 332408 ella 260045

BMW 525
Turbo Diesel 143 HK, árg. 93. Bilurin er vælhildin. Prísur einans 110.000 kr. Ring
Tlf. 266065

SAAB 900i
frá 87, koyrt 150.000 km, sentrallás og servostýring – til sølu fyri 4.000 kr.
Tlf. 316376

4 FELGUR VIÐ HEILÁRSDEKKUM
og skálum til Citróen BX og Xantia til sølu. Støddin er 185/65x14.
Tlf. 218115

FORD SIERRA
árg. 91, bíliga til sølu. Nýsýnaður, ongan x, hevur sóltak og vel, vetrardekk á felgum fylgja við.
Tlf. 373288 ella 211052

TOYOTA CARINA 1.6 DX/XL
árg. 87, rustviðgjørdur 97. Nógvir nýggir deilir, kølari, útstoyt, bremsur, stoytdoyvarar o.m.a. 4 pikadekk fylgja við. Sýnaður mai 2002, til sølu fyri 10.000 kr.
Tlf. 315552

NISSAN BLUEBIRD
Árg. '86, 2.0 SLX til sølu sum hann er. Krevur ábøtur.
Tlf. 226773

PEUGEOT 106
grønur við 3 hurðum, árg. 9/97, hevur koyrt 27.000 km. Til sølu fyri 67.995
Tlf. 265162

CITROEN XANTIA 1.9
Grønur Citroen Xantia 1.9 TD, árg. 98 til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 221375 ella 223721

NISSAN MICRA
árg. okt./98, í sera góðum standi, til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 222550 ella 322573

MAZDA 323
liftback, árg. 92, koyrt 118.000 km. Bilurin er í góðum standi, hevur nýliga skift kølaran, útstoyt og kobling. Prísuppskot: 20.000 kr. Áhugað kunnu ringja á
tlf. 311719

SPORTFELGUR TIL SØLU
15" sportfelgur við dekkum til sølu fyri 2300 kr. 14" sportfelgur við dekkum til sølu fyri 1800 kr. Passa til Honda Civic.
Tlf. 258793 ella 319378

MITSUBISHI GALANT
til sølu. Hevur brotnan motor, annars í góðum standi. Alufelgur við nýggjum dekkum fylgja við.
Tlf. 448868 ella 252368

RENAULT MEGANE 1.4
árg. okt. 98, km 56.000, í sera góðum standi, til sølu fyri kr. 80.000,-
Tlf. 213509

MAZDA 323 1.5
aut., árg. 89, koyrt 69.000 km, sýnaður fyri ca. 5 mðr. síðani, í góðum standi. Bilurin hevur 5 hurðar. Prísur 15.000 kr.
Tlf. 220744

PEUGEOT 403
2.0, árg. sept. 98, km. 65.000 til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 253184 aftaná kl. 16.00

Amboð

ÓBRÚKTIR TRYGDARSKÓGVAR
Óbrúktir trygdarskógvar av slagnum Elten, st. 45, til sølu fyri 400 kr.
Tlf. 264658/227645

Arbeiði

UNG PIGE I HUSET I SYDENGLAND
søges til at passe dreng på 2 år + rengøring/husgerning i landlige omgivelser. Du får værelse med TV, video og stereoanlæg + eget badeværelse. Email: woodgatesfarmhouse@dormansland123.fsnet.co.uk
Kontakt Mariette på tlf. 0044 1342 833 910

GENTA/KVINNA SØKIST
Vit leita eftir einari fittari barnagentu, ið kann ansa eftir Annu 4 ár og Petru 2 ár í Keypmannahavn um dagin í 3 mánaðir, meðan mamma er í skúla. Goldið verður fyri uppihald og ferð. + mánaðarlon.
Ringið á tlf. 332560 ella 221428

SØKT VERÐUR
eftir lastbilamekanikara.
J. S. Bilar, tlf. 311655

TILKOMIN KONA
søkir arbeiði, t.d. matgerð.
Tlf. 213243

VIT PRENTA
tol og búmerki á klæði og taskur. Fáið meira at vita við at ringja á tlf. 284142 frá kl. 14–18.
Vikabúðin

»ARBEIÐI TIL PENSIONIST«
Vit eru trý sambýli, ið mangla hjálp til at halda hava. Vilt tú tjena nakrar kr. eyka, so ring og tú fært nærri at vita.
Tlf. 315424 fax. 310018

VIT VASKA
Vit eru tvær ungar kvinnur, sum átaka okkum at vaska fyri fólk. Eru raskar og álitandi. Ringi
Tlf. 313942 ella 310310

ARBEIÐI YNSKIST
Eg eri ein 17 ára gamal drongur, ið søki læruplass ella arbeiði á onkrum snikkaravirki ella hjá einum timburmeistara í Havn.
Tlf. 224074 ella 313603, Rúni

HEY!
Vit eru fýra gentur, ið fegnar vilja ansa eftir rossum. Vit hava allar átt og ansa eftir rossum. Vit strigla, sópa, pleyga og ríða. Vit eru 12 ára gamlar. Okkum tørvar ikki løn.
Tlf. 255021 ella 250236

VASKIARBEIÐI
Eg eri 22 ára gomul genta, ið søki vaskiarbeiði fyrrapartar uml. 2 tímar um vikuna. Áhugaði ringið
tlf. 229112

SØKT VERÐUR
eftir álítandi fólki at byrja beinanvegin. Fish & Chips
Tlf. 317405 ella 320220

TILBOÐ YNSKIST
Tilboð ynskist at mála eini hús í Havn.
Tlf. 448105

Barnaansing

EG EITI
Símun og eri 2 ár, hvør kann ansa eftir mær gerandisdagar kl. 7.45-15.30 uml.
Tlf. 311327

HEY!
Eg eri ein fittur 3 ára gamal drongur, sum eiti Edvin, eg mangli onkran at passa meg meðan mamma og babba eru til arbeiðis. Tú mást hava onnur børn, sum eg kann spæla við. Ring og tosa við mammu á
tlf. 322205 – best um kvøldið

Barnaútgerð

BABYLIFT
Ein grá leðurlift til sølu fyri 400 kr.
Tlf. 318570

TIL SØLU
Trægrulvigarður, babylift, babystólur og pusliborð, lítið brúkt, selist bíliga.
Tlf. 456741

TIL SØLU
Bilstólur frá Baby og Barnaútgerð 0-18 kg. til sølu fyri kr. 600,00, nýprísur 1.000,00. Stólurin er bert 1 ára gamal.
Tlf. 315698

BARNAVOGNUR
Myrkabláur barnavognur við lyft til sølu fyri 800 kr.
Tlf. 449519

RIMASONG
við hjólum, madrassa, dýna og koddi fylgja við. Ljósabláur Brio koyristólur við galesju til sølu.
Tlf. 314408

KOYRISTÓLUR
Myrkabláur Brio koyristólur við kalesju - í góðum standi - bert brúktur til eitt barn. Til sølu fyri 1.000 kr.
Tlf. 310580

Bátaútgerð

YNSKIST
Glastrevja 6- til 10-mannafar í góðum standi ynskist til keyps.
Tlf. 227540

BÁTAMOTORUR
TMD 30 62 hestar - við akselskrúvu-instrumenti.
Tlf. 312954

GARNASPÆL
So gott sum nýtt garnaspæl við rullu, vælegnað til dekskbát til sølu fyri 10.000 kr.
Tlf. 333263

EIN SKANTI VHF 3000
Fleiri eyka horn kunnu setast til. Er sum spildur nýggjur, ongantið settur upp, til sølu fyri 3.400 kr.
Tlf. 332888

TIL SØLU
Ein Myra 27" glastrevjabátur v/ 200 HK Volvo Penta við fiskiloyvi selist um hóskandi boð fæst. Útggerð: egningartrakt og línurenna, radar, GPS /ekkolod, fartelefon, VHF, snellur, gogguglúpar, linuspæl.
Tlf. 258215/258049

10 TONSARI TIL SØLU
10 tonsarin, Hamranes, til sølu. Ringi
Tlf. 448074/281274

SMÍÐA BÁT!
Um tú hevur hug at smíða bát, so er eitt stórt áttamannafar til sølu. Ovasta borð, skvatlilborð og bond mangla. Báturin er gjørdur til motor.
Tlf. 254004

Bingo

BINGO
verður í Felagslonini í Fuglafirði, leygardagin 7. september kl. 19.30.
Eldrafelagið Borgin

SEYÐA-BINGO
Stórt seyðabingo verður í Skálanum mánakvøldið 9. sept. kl. 19.30. Hópin av góðum vinningum. Eisini spæla vit minibingo. Og ikki at gloyma vinningin til fulla plátu á blaðsíðu 10. Gjaldast kann við FR/Visa korti.
Bygdarfelagið Báran í Árnafirði

BINGO
verður í Pálsstovu leygardagin 7. sept. kl. 15.00. 500 kr. til fulla plátu + síðuvinningar. Á lutaseðli ein apex flogferð. Bingola. Eykaspæl. Koyring heim.
Kiwanisfelagið Rósan

VINN EIN TARV
Tygum fáa tarvin dagurðakláran frá MBM, ialt eru 15 vinningar. Seðlar fáast til keyps á øllum Shell-stoðunum kring landið og á tlf. 225200.
Bygdafelagið Báran í Árnafirði

SUÐUROYINGAR
Gott bingo verður í Framtíðini tórskvøldið 5. sept. kl. 19.30. 10 vinningar eru á lutaseðli, m.a. lomb í heyst og 500 kr. Full pláta 300 kr. Drigið verður millum spølini. Eykaspæl verður.
KFUM-skótarnir

GOTT BINGO
verður í Argja Róðrarfelag hósdagin 5. sept. kl. 19.00. Nógvir góðir vinningar, millum annað á lutaseðli balja full við mati og hjólbøra full við mati. Eykaspæl. Koyring heim. 15 plátur 100 kr. Øll eru hjartaliga vælkomin.
AB-stuðlar

Bøkur

HF-BØKUR TIL SØLU
Litterære arbejdsmønstre 1, Soft og Energi, En Vivo, Religions håndbogen og nógvar aðrar til sølu fyri 1.000 kr.
Tlf. 255492 / 222941

Burturm. /funnið

TÚ
sum hevur gloymt ein svartan jakka av merkinum All Saints, stødd XL í veitsluni hjá Ára 17. aug. verður biðin um at koma eftir honum.
Tlf. 314171

FERÐIST Í ELDUVÍK
Hús til leigu fyri stytri tíðarskeið.
Tlf. 315638, 257383

UR FUNNIÐ
á vøllinum í Rituvíkar skúla áðrenn summarfrítíðina. Urið hevur onga reim, og er av slagnum Pirelly.
Ring á 447547

500 KR Í FINNINGARLØN
til tann, ið hevur funnið mítt silvur armb. við 4 figurum (eitt jorðber, ein bamsa, ein terningur og ein rundingur við minstur á). Armb. er ein gáva frá sjeikinum, og hevur nógv persónligt virði! Sá armb. sóst tann 22. juni. um tú hevur tað/veit um tað.
Vinarliga ring 224655 - Karina

Býli

2-3 RÚMS ÍBÚÐ YNSKIST
Í Keypmannahavn, fram til hálvan desember. Møguleiki er fyri at býta um við sethús í Miðvági.
Ring á tlf. 332560 ella 221428 og hoyr nærri

ÍBÚÐ YNSKIST
Einlig mamma við 4 ára gamlari dóttur søkir íbúð í Havn. Er friðarlig, roykir og drekkur ikki og fer væl um. Max. 4.500 kr. um mðr.
Tlf. 224672

VERILSIR
mitt í býnum til leigu við atgongd til køk og bað. Eigin inngongd. Verða leigað til friðarligt fólk.
Tlf. 317801, e. kl. 18

FERÐIST Í NÓLSOY
Hús til leigu fyri stytri tíðarskeið.
Tlf. 317691 - 257383, e. arbeiðst.

HÚS TIL SØLU
Hús á Traðargøtu 13 í Klaksvík til sølu, um hóskandi boð fæst.
Tlf. 228042

Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir
(set X) undir teiginum:

❑ Akfør ❑ Amboð ❑ Arbeiði
❑ Barnaansing ❑ Barnaútgerð ❑ Bátaútgerð
❑ Bingo ❑ Brævaskifti ❑ Burturm./funnið
❑ Býli ❑ Bøkur ❑ Dansur
❑ Dýr ❑ Fundir ❑ Húsarhaldstól
❑ Innbúgv ❑ Lutaseðlar ❑ Leikur
❑ Matur ❑ Pløgg ❑ Samband
❑ Súklur ❑ Teldur ❑ Tónleikur
❑ Út-& sjónvarp ❑ Ymiskt ❑ .....

Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag. T.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi. Lýsingarnar, ið gjaldast skal fyri, koma ikki í blaðið fyrrenn tær eru goldnar.

Sent hevur:
Navn:……..
Bústaður:……
Bygd/býur:……
Tlf.: ……..

»Lýsingartorgið«
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Til frímerki